- Skulu vit fara undir at breiðka rampan, sum farmaskipini brúka og sum nøktar tann tørv, ið er, er neyðugt, at hetta er við í einari ítøkiligari ætlan sum grundarlagi, sigur Rodmundur Nielsen, býráðsformaður. Hann heldur ikki, at Nørrøna fylti so ógvuliga nógv við bryggjuna í Saltangará í síðstu viku.

Vit eru avgjørt áhugaðir í Norrønu

- Men skulu vit taka nøkur stig, mugu partarnir tosa saman, soleiðis at loysnir kunnu finnast, sigur Rodmundur Nielsen, býráðsformaður í Runavíkar kommunu

ATLØGA
Vilmund Jacobsen

Tað er neyvan nakar sum heldur, at tað altíð fer at vera so lætt hjá nýggju Nørrønu at stevna inn á Havnarvág og leggja til bryggju í tronganum beint sunnanfyri Bursatanga í Havn. Her er ógvuliga lítið spælirum, um alt ikki gongur eftir vild.

Tað var tí heldur ikki av tilvild, tá ið Smyril Line heitti á Tórshavnar kommunu um at finna eina aðra loysn enn hana, sum gjørdist veruleiki.

Sleppur Norrøna ikki til bryggju í Havn, hevur skipið onga alternativa havn, og tað kann gerast óheppið, tá ið illa vil til.

Einki formelt

Tá ið North Atlantic Fish Fair stevnan varð hildin í síðstu viku, lá Norrøna við bryggju í Saltangará sum hotel-skip. Hon sá út til at liggja bæði trygt og væl, og meðan stevnan var, vóru røddir frammi um, hví Runavíkar havn ikki verður nýtt sum alternativ havn hjá skipinum.

Rodmundur Nielsen, býráðsformaður, sigur, at býráðið hevur ikki tosað við Smyril Line um teir møguleikar, sum eru á havnalagnum í Saltangará.

- Málið hevur heldur ikki verið til formella viðgerð í býráðnum, men vit hava tosað saman mann og mann ímillum. Áhugi er avgjørt at taka nøkur stig, um málið verður aktuelt, men her verður í fyrsta lagi neyðugt hjá pørtunum at seta seg niður at tosa saman.

Rodmundur sigur, at einki skrivligt fyriliggur millum Runavíkar kommunu og Smyril Line og heldur ikki í Runavíkar býráði um málið.

- Tískil hava vit ikki sett nakað formelt ynski fram um, at vit vilja bjóða okkara havn fram til Norrønu, men vit eru avgjørt áhugaðir í at tosa um hetta, sigur hann.

Ein góð havn

Býráðsformaðurin vísir á, at nú summarið stundar til, kann ikki roknast við teimum stóru trupulleikunum í Havn.

- Men tá ið summarið er farið, stendur ein vetur fyri framman.

Rodmundur heldur ikki, at Norrøna fylti so ógvuliga nógv, sum roknast kundi við, tá ið hon lá við bryggju í Saltangará.

- Skálafjørðurin er víður, og her veðurgott á flestu ættum. Dýpið við havnalagið er eingin trupulleiki.

Hann sigur, at tað einasta, sum skal gerast, um Nørrøna skal kunna brúka havnalagið í Saltangará, er rapin, sum farmaskipini brúka í dag.

- Hesin nøktar tann tørv, sum brúk er fyri, men skal rampin eisini brúkast av Nørrønu, er neyðugt, at hann verður breiðkaður.

Rodmundur Nielsen sigur at enda, at skal Runavíkar kommuna fara undir eitt slíkt arbeiði, er neyðugt, at hetta er við í einari ítøkiligari ætlan sum grundarlagi.

- Vit hava flutt aktivitetin á havnalagnum til tess at gera økið arbeiðsligari, og vit arbeiða alla tíðina við framtíðarætlanum á havnalagnum, sigur býráðsformaðurin.

Snarferð til Billund
- við flogfari og gisting
í 2 nætur í Billund
frá kr. 2.185* t/r fyri hvønn
*til BS farbíl[illegible]
Flogfelag Føroya, Tlf. [illegible], Flogv. [illegible], travel@[illegible].fo
Faroe Flys, [illegible], [illegible]@faroeflys.fo
Mik Travel, [illegible], [illegible]@[illegible]
Faroe Travel, [illegible], faroetravel.fo
MAERSK AIR
It's got to be perfect

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

Vit kunnu ikki gera eina íløgu til »forventet fangst«

Kári P. Højgaard, formaður í havnanevndini hjá Runavíkar kommunu, heldur tað vera rættiliga náttúrligt, at alternativa havnin hjá Norrønu verður í Saltangará.
- Í fyrsta lagi er Skálafjørðurin tryggasta havnin, sum er, og her er gott pláss. Íløgan, sum skal gerast, er lutfalsliga lítil, sigur hann

ATLØGA
Vilmund Jacobsen

Kári P. Højgaard, sum er formaður í havnanevndini hjá Runavíkar kommunu, sigur, at býráðið avgjørt er sinnað at viðgera málið positivt, um eitt ynski kemur um at brúka Runavíkar havn sum alternativa havn til Norrønu

Hann heldur ikki, at neyðugt er við teimum stóru íløgunum, um verandi rampi verður breiðkaður, soleiðis at Norrøna eisini kann brúka hann.

- Men um áhugi er at gera eina íløgu á havnalagnum til "forventet fangst", ivast hann í.

Tryggasta havnin

Kári heldur tað annars vera rættiliga náttúrligt, at alternativa havnin hjá Norrønu verður í Saltangará.

- Í fyrsta lagi er Skálafjørðurin tryggasta havnin, sum er, og her er gott pláss. Eingir trupulleikar eru at bakka skipið móti rampanum, og gongst ógvuliga illa, er langur vegur yvir á vesturarmin á Skála-fjørðinum. Haraftrat kemur, at íløgan, sum neyðug er at gera, er lutfalsliga lítil.

Hann vísir á, at allar ættirnar, sum eru tær ringastu í Havn, eru tær bestu við havnalagið í Saltangará.

- Høgættin kann vera eitt sindur harðbalin viðhvørt, men hon liggur beint úteftir fjørðinum, og tí er hon heldur eingin trupulleiki hjá Norrønu.

Kári vísir á, at við fleiri árum ímillum, kann útnyrðingurin gera eitt sindur um seg, men tað er undantakið og tí heldur eingin trupulleiki.

- Tað er nógvur aktivitetur á havnalagnum í Saltangará, men tá ið oljuhavnin liggur still, eru rættiliga stór friøki.

Hann vísir á, at tá ið North Atlantic Fish Fair varð hildin í síðstu viku, gekst av tí allarbesta at skipa bilaferðsluna og parkeringsviðurskiftini, hóast eitt ótal av bilum vitjaði í økinum.

Dekningur

Kári sigur, at skal Runavíkar kommuna fara undir at fyrireika eina atløgu til Nørrønu, er neyðugt, at ein ávísur dekningur verður.

- Eg skilji væl, at skiparin á Norrønu stúrir fyri atløguviðurskiftunum í Havn á vetrardegi, tí umframt lítla spælirúmið, sum er inni við Bursatanga, er nógv skipaferðsla á Havnarvág.

Hann heldur, at tað er meira óheppið, at Norrøna ikki hevur eina alternativa havn enn, at vit ikki hava ein alternativan flogvøll.

Kári P. Højgaard endurtekur, at havnanevndin í Runavíkar býráði fer at viðgera eina møguliga umsókn um alternativa havn positivt, um ein slík kemur.

- Men skulu vit taka nøkur ítøkilig stig, mugu vit vita, hvørjum vit kunnu rokna við, sigur hann.

Javnaðarfelagið og Tjóðveldisfelagið í Eysturoynni bjóða til fundar um eftirlønir, vinnupolitikk og privatiseringar
Spurningurin um eftirlønarskiparir, vinnupolitikk og privatiseringar er meira viðkomandi nú enn nakrantíð áður. Almennur pallborðsfundur verður í Hæddini í Runavík mikukvøldið 7. mai kl. 19.30, har Vilhelm Johannesen og Andrias Petersen fyri Javnaðarflokkin og Heini O. Heinesen og Páll á Reynatúgvu fyri Tjóðveldisflokkin fara at umrøða hesi evni. Møti fjølment og vísi at áhugi fyri samfelagsviðurskiftum ger mun
Eysturoyar Tjóðveldisfelag
Eysturoyar Javnaðarfelag